# Skríggj og rópan við fiskakørini í Klaksvík

**Tað var stuttligt at koma oman á bryggjuna í Klaksvík, tá ið lív so smátt byrjaði at koma í fiskakørini, har livandi fiskar, krabbar og hummarar svimja aftur og fram í kørum**

SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið tú koyrdi omaná bryggjuna undir Klaksvíkar Timburhandli hósmorgunin, var ikki torført at finna fram til, hvar framsýningin hjá Føroya Sjómannadegi við livandi fiskum og øðrum úr havinum verður.

Gentur og dreingir stóðu rundan um kørini og forvitin eygleiddu tað, sum var í kørunum.

Onkur eldri maður var eisini fram við. Mangar fiskarnar mundu teir hava drigið um stokkin, men ikki er vist, at teir áður hava sæð, hvussu ein vælvaksin og livandi hýsa ella toskur bera seg at í sjónum.

Tá ið vit komu oman, vóru øll børnini savnaði rundan um tað eina karið, har krabbar og hummarar vóru í. Líkt var til, at tað serliga var hetta karið, sum hevði teirra størsta áhuga.

Men so var ikki.

Sum løtan leið, gingu børnini ímillum kørini, og rættiligur rómur kom í, tá ið onkur royndi at fanga livandi fiskarnar, sum svumu fram við.

Fleiri og fleiri royndu nú at liggja fram við at fanga onkran fiskin.

Ein vælvaksin hýsa hevði so góðan hug at svimja ovarliga í karinum, og so hvørt, sum hon streyk fram við børnunum, høvdu fleiri og fleiri hendurnar niðri í vatninum.

At enda var rættiligur rómur við tað eina karið, og látur og skríggj hoyrdust um bryggjuna.

– Fiskurin er so hálur, at eg fái ikki fatur á honum, læt í tí eini gentuni.

### Og so royndi hon aftur...

Jú, líkt var til, at hetta júst er nakað fyri børnini.

Í tí eina karinum eru krabbar og hummarar, og í onkrum øðrum kari eru hýsur, smáfiskar, seiður, skrubbur, krutl og ein stór longa, sum stillisliga lá og „andøvdi" við botnin.

Stuttligt er hjá bæði børnum og øðrum at síggja livandi fiskarnar svimja aftur og fram.

Hetta er ein møguleiki, sum ikki býðst á hvørjum degi.

Tiltakið hjá Føroya Sjómannadegi við livandi fiski og krabbadjórum er áhugavert og vekir stóran áhuga.

Eingin ivi um tað.



*Rættiligt lív var eina løtu rundan um kørini við livandi fiskum og krabbadjórum – og genturnar hildu seg avgjørt ikki aftur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Seta stórt tjald upp heimanfyri Timburhandilin

**– Hetta er tjaldið hjá Summarfestivalinum, sum er 50 metrar langt og 21 metrar breitt, sigur Samson Nesá, sum stendur fyri uppsetingini**

SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hósmorgunin fóru teir undir at fyrireika uppsetingina av tí stóra tjaldinum, sum kemur at standa sunnanfyri Klaksvíkar Timburhandil í sambandi við Føroya Sjómannadag.

Á bryggjuni hittu vit Samson Nesá, sum stílaði fyri hesum arbeiði.

– Tað sær kanska ikki so lovandi út, at eg standi her í oljuklæðum í morgun, men eg haldi, at hann sigur gott veður til restina av vikuni.

Samson sigur, at tað er Summarfestivalurin, sum eigur 1000 fermetra stóra tjaldið, sum nú verður sett upp á havnalagnum.

– Jú, hetta er eitt stórt og gott tjald. Tað er 50 metrar breitt og 21 metrar langt. Tjaldið verður væl „ankrað" við vektum, so tað ikki fer nakran veg, um vit fáa eitt lot, sigur hann.

Samson sigur, at Summarfestivalurin fyrst leigaði tjaldið, men hevur síðan keypt tað.

– Tær fyrstu tvær ferðirnar, vit settu tjaldið upp, høvdu vit danir til hjálpar, men nú seta vit tað upp sjálvir.

Hann sigur, at eitt slíkt tjald verður ikki sett upp uttan so, at veðurvánirnar eru nøkulunda góðar.

– Eg havi skilt, at hann sigur gott veður restina av vikuni, og vónandi fáa vit eisini turt veður í vikuskiftinum, nú Føroya Sjómannadagur verður hildin her norðuri.

Spurdur, hvørji tiltøk verða í tjaldinum, sigur hann, at tað er hann ikki heilt greiður yvir, men vísir á, at her verður stórt sjómansmøti sunnukvøldið, har Rógvi Joensen skipar fyri.

– Eitt slíkt tjald kann eisini koma væl við, um tað skuldi farið at regna, men vit vóna sjálvandi, at veðrið verður gott og turt, sigur Samson Nesá, sum væntar, at tjaldið stendur uppi, tá ið líður út á náttina.



*– Tað sær kanska ikki so lovandi út, at eg standi her í oljuklæðum, men eg haldi, at hann sigur gott veður restina av vikuni, sigur Samson Nesá*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*